# Vegirnir dýrastir í Eysturoy

Hvør kilometur av landsvegi í Eysturoynni kostar 205.451 krónur at reka, meðan teir næst dýrastu vegirnir eru í Norðuroyggjum, har hvør kilometur kostar 182.251 krónur at reka. Bíligastu vegirnir í landinum eru í Suðuroy. Har kostar hvør kilometur 99.325 krónur í rakstri um árið. Í Streymoy kostar hvør kilometur av landsvegi 131.921 krónur, Í Vágum 119.731 krónur, meðan hvør kilometur í Sandoynni kostar 104.536 krónur um árið.



# Streymloysi á Tvøroyri

Fyrrapartin í gjár var Tvøroyri uttan streym í ein tíma. Orsøkin til streymslitið var, at ein maskina, ið grevur fyri nýggjum leidningum hjá SEV, skaddi ein háspenningskaðal í Froðba. Menn frá SEV fóru beinanvegin í gongd við at umleggja streymveitingina soleiðis, at fólk fingu streymin aftur. Og seinnapartin í gjár var so farið undir at umvæla skadda kaðalin, skrivar SEV á heimasíðu sínari.

*Fyrsta brævið frá Christiani Matras til William Heinesen:*

*Havn tann 12 nov. 1916*

*Goði vinur!*

*Hóast eg ikki skrivaði aftur alt fyri eitt, mást tú kortini ikki trúgva, at eg havi gloymt teg ella tey minnir, ið tú manar fram í brævi tínum. – Mær tykir sanniliga eins og tú, at tann tíðin táið vit gingu og tosaðu um – ja, tú veitst hvat, hóast eg ikki kann siga við einum orði, hvatið tað var, – var sum lukkuligasta í mínum ungu lívi.1 Nógv er ímillum nú, táið alt er líka deytt – og eg ongan, ja als ongan vin havi, – Á, hvat er lívið hjá mær nú einkiseyandi og tómt. – tað einasta, ið meg uggar er tey ting, ið eg havi í skúlanum. Tó, nú leyg eg, tí eg hugsi at Jeppe Aakjær2 er störri troyst, hansara frágera vökru og frísku yrkingar! – Eini tíðindi kann eg siga tær, og tað er at eg eri í einum „religiösum“ kampi nú; og ikki veit eg hvönn veg tað verður, annahvört eg verirættiliga „rættrúgvandi“, ella reinur frítenkjari – eg hugsi tað seinna.*

*Tú skrivar um Karl3, at hann hevur eini góð ráð til mín, og at hann saktans hevur skriva til mín – men nei. Tí biðji eg teg um at gera sovæl, at flýggja honum hetta brævið, ið eg nú leggi inní.*

*Nú í kvøld, meðan eg siti og skrivi her við vindeygað – tú veitst hvat! síggi eg ein stak vakran himin við nógvum litum, og fögrum formoðum skýggjum. Tað vekir tvær kenslur mær í brósti – nevniliga heimtráan – til Viðareiðis – og útlongsul – til Útlanda, hagar eg vónandi sleppi súmarið komandi!4*

*Her ganga sum tú vist veitst meslingar, og eg vænti mær teir nú fyrsta dagin – keðiligt, tí so komi eg at missa so nógv frá skúlanum.*

*Veitst tú, at hann sjálvur Per Gynt er farin niður til flatlanda fyri at fáa heilsubót? Synd er í honum, tí av grundini er hann eitt frálíka gott fólk, og sjálvsagt er tað keðiligt fyri okkum so tíðum at skifta lærara.*

*Nei, nú havi eg ríslað nóg nógv fyri hesi ferð.*

*Ein vinalig heilsan*
*frá vini tínum*
*Kristian*

*Adr. Frú S. Lützen5*
*Tórsgötu*
*Havn*

*NB Fyrigev mær fyri ta ringu skrift!*

SP/F HJÁLPIRÓT
Urtagarðsvirksemi
Góð mold til sølu
Sorterað, sandblandað mold
til sølu fyri 325 kr./m³
Hjálpirót Sp/f · Boks 1286
FO-110-Tórshavn · Tlf: 316505 / 516505




# Matras,
# lal út í bók

familjuna, føðingar, andlát, heilsanir til konur og børn, hjartasuff um ov nógv at gera o.s.fr.

Kortini eru brøvini meiri persónlig í perspektivi og stíli, heldur enn privat, og tað er tí eingin orsøk hjá lesarum at kenna seg at sneyta við at lesa brøv hjá øðrum.

Christian Matras ynskti at hansara savn av brøvum v.m., har ímillum samskifti við William Heinesen, Karsten Hoydal og fleiri aðrar rithøvundar, skuldi latast Fróðskaparsetrinum í varðveitslu. Brøv frá Christiani Matras til Karsten Hoydal vóru varðveitt privat í mong ár og eru síðani latin Landsbókasavninum í varðveitslu. William Heinesen lat sjálvur brøv, m.a. frá Christiani Matras, til Bókasavnsgoymslu í Keypmannahavn. Brøvini eru givin út við loyvi frá familjuni hjá brævaskrivarunum.

Anne-Kari Skarðhamar er dr.art., og fyrstiammanuensis við Høgskolen i Oslo, Avdeling for lærerutdanning og internasjonale studier. Hon hevur áður givið út *Poetikk og livstolkning i Christian Matras' lyrikk* (2002), *Fyrvokteren ved verdens ende og hans laterna magica* (2005), *Periferi og sentrum. Tolv artikler om færøysk litteratur* (2006) og hevur ritstjórnað tilfar hjá Christian Matras *Yrkingar. Heildarsavn við yrkingum og týðingum* (2004).

Bókin *Christian Matras' brevveksling med William Heinesen og Karsten Hoydal* er 507 síður og fæst til keyps í bókabúðunum.

